# **84** prosent velja stilettir

## Røddin hjá fólkinum

Í óvísindaligari kanning millum 203 tilvildarligar føroyingar ein tilvildarligan seinnapart í SMS, sæst, at 78 prosent av monnunum og 89 prosent av kvinnunum dámar betur myndina av eini kvinnu í stilettum, enn eina mynd av eini kvinnu í fløtum skóm.

Tilsamans gevur hetta 84 prosent av teimum 203 fólkunum, ið velja myndina av kvinnuni í stilettum.

Av teimum 99 spurdu monnunum valdu 77 myndina í stilettum, og av teimum 104 spurdu kvinnunum valdu 93 myndina, har kvinnan er í stilettum.

Nakrir vansar er tó við hesi kanning. Serliga eru litirnir á myndunum ikki heilt eins, perspektivið er eitt lítið sindur forskotið og summi av teimum spurdu vildu vera við, at hesir faktorar talaðu til fyrimuns, fyri myndini, har kvinnan er í stilettum. Hóast onkur vildi vera við, at myndin var viðgjørd, so at kvinnan í stilettum gerst longri og klænri, so eru proportionirnar á myndunum ikki viðgjørdar eftir, at myndin var tikin.


Mynd: Álvur Haraldsen


Mynd: Álvur Haraldsen

Nøkur av fólkunum høvdu konkretar viðmerkingar til síni svar til myndirnar.

*– Hon sær so køggut út í fløtum skóm*

*– Íjøsus tað er gott, at eg næstan altíð nýtið stilettir*

*– Eg velji hana í stilettum, tí hon passar betri til tað, bløðini siga*

*– Tann í fløtum skóm sær natúrligari út*



verið nakað serligt. Í Kina gera tey nógv burtur úr, og eitt nú vita vit frá akupunktur og zonuterapi, at fóturin ávirkar allan kroppin. Í Eysturlondum verða føturnir eisini ofta masseraðir, og nýttir til at massera við.

– Almenna fatanin í Føroyum er, eftir mínum tykki, at kynslívið annaðhvørt er avmarkað til at gera børn, ella tað reina porno. Tí duga vit ikki at virðismeta alt tað fína og vakra, sum er ímillum. Til dømis føturnar, og tað er spell, tí tað hava teir uppiborið, heldur Marit Holm Petersen, sum leggur afturat, at meðan skógvarnir hava fingið sítt uppiborna pláss í skápinum og hugaheiminum, so hava føturnar ikki nakað tilvitað pláss her í landinum. Kvinnur skammast snøgt sagt av fótum sínum.

### Skrúvibløð ella skógvar

Tá samanum kemur, so elska vit mannfólk høgar hælir. Tað vísir óvísindaliga kanningin her á síðuni.

Marit Holm Petersen heldur ikki, at mannfólk skulu royna at skilja, hví kvinnur vilja hava so nógvar skógvar.

– Tað er tað sama sum við skrúvibløðum hjá mannfólki. Teir skulu hava 50 ymisk skrúvibløð, og vit skulu hava 50 ymisk pør av skóm. Vit skulu ikki stríðast við at royna at skilja, men heldur góðtaka hvønn annan, sigur hon.

Og so nýtast mannfólkini heldur ikki at blanda seg uppí, hvussu nógvar pengar kvinnan brúkar til skógvar. Tí í flestu førum elska mannfólk tað, sum skógvarnir gera við kvinnuna.